

## Keikti fótin

Tað tóktist sum sera álvarsligur skaði, tá Hanus Thorleifsson hjá B36 mátti berast av vøllinum. Hetta hendi, tá hann ein av bestu møguleikunum hjá B36 í dystinum, men varð tacklaður hart í skotroyndini.

Eftir dystin høvdu vit orðið á Bjarna á Steig, sum er lækni hjá B36, men hann væntaði ikki, at talan var um heilt álvarsligan skaða.

- Hann hevur nokk keikt fótin. Enn eru sjey dagar, til B36 skal spæla aftur, og so fæst at vita, um hann er tøkur til ta tíð, segði læknin.

**-mørk**

## Atgongumerki til Skotlands-dystin

Fótbóltssambandið hevur á heimasíðu síni boðað frá, at tey nú hava fingið boð um, hvar føroysku áskoðararnir skulu hýsast, tá Føroyar tann 2. september vitja á Celtic Park.

Føroysku áskoðararnir skulu her sita á suðurendanum av stadion, og nú ber so til at bíleggja sær at atgongumerki.

FSF heitir á fólk um at bíleggja hesi sum skjótast, við at senda teldubræv til fsf@football.fo. Kostnaðurin fyri atgongumerkini er 215 kr. fyri hvørt.

**-mørk**

Føroyar U19 – Ongland 0-1 (0-0):

# Kundu vunnið men mistu alt



*Hóast tvey ár á muni var enska liðið á allar mátara líka væl fyri sum tað føroyska*
*Mynd Heini S. Kristiansen*

**Føroyska liðið rakti stongina tvær ferðir seinastu løtuna, og í staðin vóru tað onglendingar, sum struku avstað við sigrinum**

NM-KAPPING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroyska liðið stóð sterkari í myndini enn tað enska, men kortini vóru tað bretar, sum fingu øll trý stigini við sær av vøllinum í Klaksvík í dag.

Talan var um ein rættiliga javnan dyst, og mótstøðan føroyingar fingu í gjár var munandi harðari enn tann norðmenn borðreiddu við í mánadagin. Og hóast bretar vóru tað yngri enn okkara U19-landslið, so vóru teir líka fyri sum føroyingar á øllum økjum.

Tá vanliga leiktíðin var farin stóð var framvegis talan um ein málleysan dyst. Tá hevði tað tó ligið í luftini longi, at eitt mál var ávegis, tí minuttirnar framman undan høvdu føroyingar rakt stongina tvær ferðir og bretar høvdu rakt yvirleggjaran einaferð.

### Útvísing og mál

Tá eitt korter var eftir av vanligu leiktíðini, valdu føroyingar at satsa frameftir. Tveir defensivir leikarar vórðu fluttir longur fram á vøllin í eini roynd at vinna dystin, tí tað var als ikki nøkur ómøgulig uppgáva.

Hetta var eisini um at geva úrslit og kasta mál av sær til Føroyar, men gav tað eisini onglendingum møguleikar fyri at kontra. Hetta kostaði í hinum endanum, tí tá nakrir fáir minuttir restaðu í, slapp ein onglendingur einsamallur móti verjuskansanum Jóhan Davidsen. Í nærdystinum fer onglendingurin um koll og linjuverjin veitraði og segði, at Jóhan nýtti neyðbremsuna. So var bara eitt at gera hjá dómaranum, og tað var at vísa Jóhan Davidsen av vøllinum.

Hetta var ein avgerð, sum ikki fall í góða jørð hjá føroyingunum, og royndu teir eisini at vísa á, at Sam Jacobsen var beint við, og at tað tí ongantíð kundi vera talan um neyðbremsu frá Jóhan Davidsen. Hetta nyttaði tó lítið og avgerð dómarans stóð við.

Fáar minuttir seinni skora onglendingar so einasta málið í dystinum. Teir reka niðan í høgru síðu og sleppa sær í millum bakkin og miðverjuleikaran. Síðani verður smekka til, bólturin situr í netinum og onglendingar skoraðu harvið einasta málið í dystinum, sum eisini var eitt av tí vakra slagnum.

### Uppborin sigur

Soleiðis endaði dysturin við einum 0-1 sigri til Ongland. Ein herskin biti at svølgja, men sigurin var uppiborin hóast tað leikaði javnt á stóran part av dystinum. Onglendingar kendu sína vitjunartíð, meðan Føroyar ikki tóku av møguleikunum, tá teir stóðu teimum í boðið.

Næsta uppgáva hjá U19 verður í Runavík hósdagin, har teir skulu leika ímóti Svøríki.

## FAKTA

**Føroyar U19 - Ongland 0-1 (0-0)**
**0-1:** Daniel Rose, 80.
**Føroyar:** Rógvi Ryggshamar -Pætur T. Jørgensen, Sam Jacobsen, Jóhan Davidsen, Einar Hansen - Oddmar Færø, Ólavur í Ólavsstovu, John Hansen (Henning Joensen, 46.) - Kristoffur Jakobsen (Jann Martin Mortensen, 74.), Jón Krosslág (Ári Samson, 29.), Levi Hansen.
**Á bonkinum uttan at koma inn:** Niklas Eysturoy, Frank Poulsen, Mathias Samuelsen.
**Venjari:** Bill M. Jacobsen
**Gult kort:** -
**Reytt kort:** Jóhan Davidsen
**Dómari:** Tom H. Hagen

## Øðrvísi treytir enn vanligt

Føroyska U19-landsliðið hevur í hesi kapping fingið ein leiklut, sum teir ikki eru vanir at átaka sær. Leikararnir eru tvey ár eldri enn restin av mótstøðuleikarunum og tað merkir, at teir eru minst líka væl fyri, um ikki betri, enn restin.

Hetta hevur við sær, at teir nú skulu inn at skapa dystin og ikki verja borg, sum teir annars ofta gera.

Í dystinum móti finnum lá væl fyri at skapa dystin og skaptu teir eisini eina rúgvu av møguleikum. Móti onglendingum var ætlanin tann sama, men komu teir ikki fram til heilt so nógvar málmøguleikar, sum teir høvdu ætlað. Kortini spældi føroyska liðið væl, og tað verður mett at vera sera umráðandi.

Bill McLeoud Jacobsen er venjari hjá føroyska U19-landsliðnum og hann heldur, at kappingin lið hansara nú er við í er kærkomin.

– Hetta eru heilt øðrvísi treytir vit spæla undir enn vanligt. Vit eru vanir at skula leggja størst vekt á verjupartin og at stríðast fyri, at mótstøðuliðið ikki sleppur í gjøgnum hjá okkum. Nú skulu vit inn at vera við at skapa dystin, tí teir vit spæla ímóti her, eru á sama støði sum vit hóast teir eru tað yngri, greiðir landsliðsvenjarin frá.

Hetta hevur samstundis møguligar broytingar í vanligu uppstillingini, og at venjarin má leggja dent á aðrar partar enn hann vanliga ger.

– Vit hava at kalla ikki hugsa um verjupartin undan hesum dystunum, tí vit vilja vera við at mynda dystin, tá vit nú hava møguleika fyri tí. Í heyst skulu leikarar okkara aftur til eina kapping, men verður tað ímóti leikarum á teirra aldri. Tá skulu vit nokk fáa verjupartin royndan, so nú royna vit at hugsa fram eftir vøllinum, tá møguleiki er til tess, sigur Bill McLeuod Jacobsen, venjari hjá U19-landsliðnum.

**-rwd**